## Umhvørvisleiðari

IRF søkir við hesum eftir umhvørvisleiðara at byrja skjótast gjørligt.

Umhvørvisleiðarin hevur beinleiðis tilvísing til stjóran.

Talan er um eitt heiltíðarstarv, og tann, ið settur verður, hevur m.a. hesar uppgávur:

- vera við at menna viðgerðina av burturkasti
- fylgja við í rákinum innan viðgerð av burturkasti
- røkja sambandið við myndugleikarnar á umhvørvisøkinum
- fylgja við á lóggávuøkinum innan umhvørvi
- hava ábyrgd av innsavning og viðgerð av vandamiklum burturkasti
- menna mannagongdir og edv v.m. innan skráseting og bólking av burturkasti
- skipa fyri innaneftirliti á t.d. Brennistøðini, tyrvingarplássum og Spilloljuverkinum.

Allar skrásetingar verða dagliga førdar á teldu, og er tað tí avgjørt neyðugt, at umsøkjarin hevur góðan praktiskan og teoretiskan kunnleika til skrivi-, rokni-, og telduarbeiði.

Arbeiðið er sjálvstøðugt og fjølbroytt, hevur nógvar persónligar menningarmøguleikar, eins og tað setir krøv til góð samstarvsevni, menniskjansligan og fakligan førleika. Alt hetta í einum góðum arbeiðsumhvørvi.

Lønin verður sett eftir avtalu.

Tann, sum settur verður í starv skal hava hægri útbúgving innan t.d. verkfrøði. Kunnleiki til umhvørvi og viðgerð av burturkasti er ein fyrimunur.

Nærri fæst at vita við at tosa við Sólrun Poulsen ella Poul Andrias Joensen, tlf. 443343.

Skrivlig umsókn við avriti av prógvum og møguligum ummælum verður at senda til:

IRF
att.: Poul Andrias Joensen
Postboks 39
FO-520 Leirvík, **innan 16. mars**

***IRF hevur til endamáls:***
*Sambært umhvørvisverndarlógini hava kommunurnar ábyrgdina av innsavning og viðgerð av burturkasti.*
*IRF ger hetta arbeiði fyri kommununar.*
*Arbeiðið fevnir um innsavning og viðgerð av burturkasti í øllum limakommununum.*
*IRF hevur eina brennistøð, seks tyrvingarpláss, umlastingarstøð, ruskbilar, oljureinsiverk, lastbila- og bingjuverkstað, slamsúgvarar og rottangatænastu.*
*Uml. 50 fólk eru í føstum starvi hjá IRF.*




Vit gera alt
URTAGARÐSARBEIÐI

• Grasvøllir • Planting • Viðlíkahald
• Seta gravsteinar upp v.m.
• Gera tún við flisum ella oljugrúsi
• Grevstur í sambandi við olljutangaskifti o.a.

Spyr - tað kostar einki!

Við 25 ára royndum hava vit roynt tað mesta

Fa. SÍMUN DALSGAARD
Boðanesgøta • FO-188 Hoyvík
Tel. 31 54 78 • Fartel. 28 21 00 • Fax 32 04 78


## Stuðulsfólk

Søkt verður eftir avloysara fyri stuðulsfólk til 14 ára gamla gentu, sum er rørslutarnað.

Arbeiðið hjá stuðlinum verður, í neyvum samstarvi við familjuna, Almannastovuna og onnur fakfólk, at stuðla rørsluligu menningini og annars fara við gentuni til ymisk tiltøk. Stuðulin skal kunna arbeiða sjálvstøðugt.

Arbeiði hjá stuðlinum verður 30 tímar um vikuna.

Setunartíðin er frá uml. 15.03.00. til uml. 01.10.00.

Ynskiligt er, at tann ið settur verður, hevur hóskandi fakliga útbúgving og/ella royndir at arbeiða sum stuðul, og neyðugt er at viðkomandi hevur koyrikort.

Lønar- og setunarviðurskiftini eru sambært sáttmála ímillum Fíggjarmálastýrið og Føroya Pedagogfelag.

Nærri fæst at vita um starvið, við at ringja tlf. 314822, Ragnhild Dahl.

Umsóknir mugu vera okkum í hendi í seinasta lagi 11.03.00 og skulu sendast til:

**Almannastovuna**
Eysturoyar deild
att: Hildur Vang
Heiðavegur
600 Saltangará

Fróðskaparsetur Føroya

## Cambridge Examinations

**Certificate in Advanced English (CAE) og Certificate of Proficiency in English (CPE)**

Tilmeldingarfreistin til próvtøkurnar í mai/juni 2000, er úti 10.3.2000 kl. 12.00

**Tilmeldingargjald:**
Certificate in Advanced English 800 kr.
Certificate of Proficiency 900 kr.

**Tilmelding fer fram á**
Setursskrivstovuni kl. 09.00-16.00 vanligar dagar og til kl. 12.00 fríggjadagin 10.3.2000.

**Setursskrivstovan**
Handan Á 5
Fróðskaparsetur Føroya
Tlf. 315302

**Frá**
## Tvøroyra Sosial-demokratiska felag

Aðalfundur felagsins verður mánakvøldið 13. mars 2000. Skrá sambært lógum felagsins.

Tíð og stað verður lýst nærri.

**Nevndin**

Hendan ogn verður lýst til sølu:

## Hús í Bringsnagøtu, Tórshavn

Vegna Føroya Skiftirætt verður ognin Bringsnagøta 10 lýst til sølu.

Grundøkið er uml. 110 $m^2$

Húsini eru í tveimum hæddum, uml. 85 $m^2$ hvør og treingja til ábøtur.

Føroya Skiftirættur tilskilar sær rætt til at velja millum tilboð, ið koma inn, og til einki at góðtaka.

Nærri fæst at vita um ognina við at venda sær til skrivstovu okkara:

**Advokatskrivstovan**
**Fr. Petersensgøta 9**

Halgir Winther Poulsen, adv. — Magnus S. Petersen, adv.
Fríða Patursson, adv. — Ólavur Jákup Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv. — Niels Winther Poulsen, adv.

**Tlf. 311145**

**Sjúkrasystrafelag Føroya**
Lucas Debesargøta 14 • Boks 1285 • FO-110 Tórshavn
Faroe Islands • Tlf. +298 311309 • Fax +298 316272
e-mail: SFF@post.olivant.fo

## Ársaðalfundur

Ársaðalfundurin hjá Sjúkrasystrafelag Føroya verður leygardagin 25. mars 2000 kl. 10.00 á Hotel Föroyum. Morgundrekka fæst frá kl. 9.30–10.00.

Dagsskrá:
1. Val av fundarstjóra
2. Val av atkvøðuteljarum
3. Góðkenning av dagsskrá
4. Góðkenning av starvsskipan
5. Frágreiðing formansins
6. Framløga av rammufíggjarætlan og roknskapi, harímillum ásetan av limagjaldi
7. Innkomin uppskot
8. Val av tveimum grannskoðarum.
9. Ymiskt

Uppskot, sum skulu verða viðgjørd á aðalfundinum, mugu verða felagnum í hendi 1. mars 2000.


## KOKKUR OG HJÁLPARFÓLK

***Søkt verður eftir útlærdum kokki og hjálparfólki til køkin at byrja í mai mánað.***

***Umsókn við møguligum prógvum skal sendast til***

*Hotel Föroyar*
*Postboks 3303*
*110 Tórshavn*

*Meira fæst at vita um arbeiðið við at ringja á tel. 317500 og spyrja eftir Gunndur.*

Hotel Föroyar
Best Western
**Tlf. 317500**
**Hotellið við útsýninum**

Sosialurin - 311820




## Fíggjarleiðari

IRF søkir við hesum eftir fíggjar- og roknskaparkønum fólki at byrja skjótast gjørligt.

Fíggjarleiðarin hevur beinleiðis tilvísing til stjóran.

Talan er um eitt heiltíðarstarv, sum m.a. fevnir um:

- uppseta mánaðar- og ársroknskapir og fíggjarætlanir
- fíggjarstýra útlán og innistandandi, innan- og uttanlands
- starvsfólka- og sáttmálaviðurskifti
- menna mannagongdir og edv v.m. á fíggjarliga økinum
- ábyrgdina av dagliga bókhaldinum, har trý fólk arbeiða

Allar skrásetingar verða dagliga førdar á teldu, og er tað tí avgjørt neyðugt, at umsøkjarin hevur góðan praktiskan og teoretiskan kunnleika til skrivi-, rokni-, og telduarbeiði. Kunnleiki til Concorde Axapta og SQL er ein fyrimunur.

Arbeiðið er sjálvstøðugt og fjølbroytt, hevur nógvar persónligar menningarmøguleikar, eins og tað setir krøv til góð samstarvsevni, menniskjansligan og fakligan førleika. Alt hetta í einum góðum arbeiðsumhvørvi.

Lønin verður sett eftir avtalu.

Hevur tú hollar royndir innan bókhalds-, roknskapar- og fíggjaryrkið, við ástøðiligari útbúgving, eitt nú cand. merc., HD ella aðrari viðkomandi útbúgving, ert tú møguliga tann, vit søkja.

Nærri fæst at vita við at tosa við Sólrun Poulsen ella Poul Andrias Joensen, tlf. 443343.

Skrivlig umsókn við avriti av prógvum og møguligum ummælum verður at senda til:

IRF
att.: Poul Andrias Joensen
Postboks 39
FO-520 Leirvík, **innan 16. mars**

***IRF hevur til endamáls:***
*Sambært umhvørvisverndarlógini hava kommunurnar ábyrgdina av innsavning og viðgerð av burturkasti.*
*IRF ger hetta arbeiði fyri kommununar.*
*Arbeiðið fevnir um innsavning og viðgerð av burturkasti í øllum limakommununum.*
*IRF hevur eina brennistøð, seks tyrvingarpláss, umlastingarstøð, ruskbilar, oljureinsiverk, lastbila- og bingjuverkstað, slamsúgvarar og rottangatænastu.*
*Uml. 50 fólk eru í føstum starvi hjá IRF.*

## Aðalfundurin hjá MBF 2000

Aðalfundurin hjá MBF verður leygardagin tann 25. mars kl. 15.00 í MBF-húsinum, Íslandsvegur 10c, 100 Tórshavn.

Mál, ið skulu viðgerast á aðalfundinum, mugu verða starvsnevndini í hendi 14 dagar áðrenn aðalfundin, tað vil siga **fríggjadagin tann 10. mars 2000.**

mbf **Nevndin**

FÍGGJARMÁLASTÝRIÐ

## FULLTRÚAR

Søkt verður eftir tveimum fulltrúum til Fíggjarmálastýrið. Arbeiðsøkið er sjálvt Fíggjarmálastýrið.

**Í Fíggjarmálastýrinum verður arbeitt við:**
- Játtanarskipan landsins
- Fíggjarlóg og øðrum játtanarlógum
- Kapitalmarknaðarviðurskiftum
- Búskaparanalysum
- Búskaparmodellum
- Toll-, skatta-, kolvetningsskatta- og mvg-lógarfyrireiking

**Starvið**
Fulltrúar í Fíggjarmálastýrinum fáast við eitt fjøllbroytt úrval av ráðgevandi, fyrisitingarligum og analytiskum uppgávum á teimum økjum, stýrið umsitur m.a.:
- Ráðgeva landsstýrismanninum í fíggjarmálum
- Lógarfyrireiking og málsviðgerð
- Loysa tvørgangandi og samskipandi uppgávur
- Gera analysur, langtíðarætlanir og tryggja, at hesar verða framdar
- Ráðgeva og leiðbeina aðalstýrum og stovnum

**Førleiki**
Vit hava hugsað okkum, at tú hevur samfelagsvísundaliga útbúgving av hægri lærustovni.

Tú skalt eisini duga at arbeiða sjálvstøðugt og samstarva í arbeiðsbólkum.

**Vit bjóða**
- Starv, sum til tíðir er strevið við longum arbeiðsdøgum, men samstundis sera áhugavert við nógvum samskifti úteftir
- Fjølbroyttar uppgávur, har tú m.a. fert at arbeiða nógv saman við teimum politisku myndugleikunum
- Sjálvstøðugt starv, sum tú ført høvi at vera við til at skapa
- Flex-tíð
- Skeið og eftirútbúgvingarmøguleikar

Arbeitt verður á høgum fakligum stigi, so tað eru góðir møguleikar fyri bæði persónligari og fakligari menning.

Fíggjarmálastýrið heldur til úti á Argjum saman við Føroya Gjaldstovu, Toll- og Skattstovu Føroya, Stýrinum, Hagstovu Føroya og Lønardeildini hjá Fíggjarmálastýrinum. Talan er sostatt um eitt stórt og spennandi umhvørvi.

Setunartreytir eru eftir sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og samsvarandi fakfelag.

Viðmerkt skal vera, at setanin fatar um alt Fíggjarmálastýrið og stovnar undir tí, umframt Løgmansskrivstovuna og hini aðalstýrini.

**Umsókn**
Umsóknin við prógvum o.ø. skal verða send:

***Fíggjarmálastýrið***
***Postboks 2039 — FO-165 Argir***

Vit skulu hava fingið umsóknina í seinasta lagi mikudagin 16. mars 2000 kl. 12.00.

Størvini verða sett skjótast tilber.

Vilt tú hava meira at vita um starvið, kanst tú ringja til Petur Alberg Lamhauge, fíggjarmálastjóra á tlf. 35 20 20.

## Ruskinnsavnari til meginøkið hjá IRF

Søkt verður eftir einum ruskinnsavnara til meginøkið, sum umfatar Eysturoy og Norðstreymoy, at byrja 6/3-2000, ella skjótast tilber.

Arbeiðið umfatar:
I. Innsavnan av húsarhaldsposum
II. Heintan av burturkasti frá virkjum og bingjuplássum
III. Umframt annað fyrifallandi arbeiði hjá IRF.

Krøv til umsøkjaran:
I. Stóra koyrikortið, og vanur at koyra lastbil.
II. Skal kunna arbeiða sjálvstøðugt.

Galdandi sáttmáli:
Lønarsáttmáli fyri fastløntar millum Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag.

Skrivlig umsókn skal vera okkum í hendi innan hósdagin 2/3-2000.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til tlf. 443343 ella 212843, Heðin Zachariasen.

IRF **Postboks 39**
**520 Leirvík**

**HEIMARØKTIN**
**Sandoyar øki**

## Avloysarar

Søkt verður eftir 2 avloysarum fyri heimahjálpara/almanna- og heilsuhjálpara, fyribils til 1. sept. 2000, til Heimarøktina í Sandoynni, at byrja skjótast tilber. Arbeitt verður bæði inni á bústovnum og heima hjá brúkarum í Sandoyar økinum. Arbeiðstíðin er 25 tímar um vikuna í skiftandi vaktum.

Ynskiligt er, at umsøkjarin hevur útbúgving ella royndir innan eldrarøkt.

Starvið verður lønt eftir sáttmála millum Heimahjálparafelag Føroya og Fíggjarmálastýrið.

Um tú ynskir at vita meira um starvið, ert tú vælkomin at ringja til Eftirlitskvinnuna tlf. 361791.

Umsóknin skal sendast í seinasta lagi 02.03.2000 til:

**Heimarøktin Sandoyar øki**
Att.: Sanna Petersen, eftirlitskvinna,
210 Sandur

## Frá Eydnuni

Atgongumerkir til føstulávintsveitsluna tann 4. mars verða seld í Eydnuni leygarkvøldið 26. februar frá kl. 18.00 til kl. 22.00. Kostnaður kr. 150,00.

**Eydnan**